# Gullbrúðarparið Lina og Tummas Anthoniussen

Fríggjadagin tann 14. juli kunnu hjúnini Lina og Tummas Anthoniussen halda gullbrúdleyp.

Tummas er ættaður úr Oyndarfirði, sonur Poul Martin (bátasmiðin) og Edel Anthoniussen. Lina er ættað av Oyrarbakka, dóttir Sannu og Poul Andreasen.
Lina og Tummas eiga trý børn, Annu, Sólgerð og Thorleif, 11 ommu- og abbabørn og 4 langommu- og langabbabørn.

Vit ynskja tykkum hjartaliga til lukku við gullbrúdleypsdegnum og nógv góð ár framyvir. Harrans signing og takk fyri alt, tit hava verið fyri okkum.

Heilsan

**Børn og barnabørn við familju**

P.S. Tey eru burturstødd.



## Dagurin í morgin

**13. juli. Margreta**, deyð umleið ár 300. Var úr Antiokia, og foreldrini vóru heiðin.. Hon tók við kristnari trúgv. Av tí at hon ikki vildi lovast heidna herføraranum Olymbrias, var hon hálshøgd. Ein margretumessa hevur eisini verið hildin. Margreta merkir *perla* á grikskum máli.

## Prógv

Súsanna Viderø, Tórshavn, búsitandi í Ålborg, hevur lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við Sundheds CVU Nordjylland Sygeplejerske uddannelse Ålborg.

# Myndin úr Klaksvík var speglvend

Norðmaðurin Trygve Langrusten, sum vitjaði her nakrar dagar, hevði eina ávísa orsøk til at koma til Føroyar og serliga til Klaksvíkar.

Tá hann sum skúladrongur gekk í 4. og 5. flokki vóru onkrar myndir í landalærubókini "Geografi for folkeskolen", sum høvdu hansara serliga áhuga. Hann setti sær fyri, at hann einaferð í lívinum skuldi vitja júst hesi støð. Eitt var Tingvellir í Islandi og hitt var Klaksvík, sum vóru einastu myndir úr Íslandi og Føroyum, sum var í bókini.

Í 2000 var hann í Íslandi og tók myndir av Tingvellum, og í ár kom hann so til Føroyar og vitjaði júst á sama staði í Klaksvík, sum myndin var tikin einaferð í 50-unum. Í Klaksvík fekk hann trupulleikar við at finna økið, har myndin var tikin. Tað vísti seg at myndin í landalærubókini var speglvend, men hann fekk góða hjálp frá klaksvíkingum á staðnum.

Trygve Langrusten er 53 ára gamal og býr í bygdini Heidal. Hann arbeiðir sum umsjónarmaður á einum skúla í Gudbrandsdalinum. Hann hevur verið við í nógvum revyum har og gjørt fleir sangir og løg.

Hann varð so hugtikin av Føroyum og føroyingum at hann yrkti sangin "Nabobesøk", sum hann sjálvur hevur gjørt lag til.



*Trygve Langrusten við landalærubókini "Geografi for folkeskolen", har myndin úr Klaksvík hevði hansara serliga áhuga. Nú hevur hann so verið á staðnum og sæð hvussu har sær út í dag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## *Nabobesøk*

*På skolen i min hjembygd, vi hadde mange fag.*
*Og vi ble full av visdom, på hver en skoledag.*
*Vi tegnet og vi leste, vi diktet og vi sang.*
*Og det var ro og disiplin, ja, hele dagen lang.*

*Så kom den dag jeg leste, i læreboka mi.*
*Om verdens land og riker, med kart og bilder i.*
*Der så jeg noen øyer, i havet langt der vest.*
*Da tenkte jeg, at engang skal jeg være der som gjest.*

*Nå endelig kan drømmen, få sin fortjente lønn.*
*Nå kan jeg se naturen, og du, og du: Så skjønn.*
*Da smaragdgrønne klipper, som kneiser opp mot sky.*
*De står som tause vitner, og de vokter bygd og by.*

*Ved havnens mange brygger, ligg båtene i ro.*
*Det var nok mye verre, da kjempebølgen slo.*
*Havet er en arbeidsplass, for mang en fisker her.*
*Med fiskebåten drar de ut, hver dag i allslags vær.*

*Ja, øyene var norske, i mange, mange år.*
*Og nå så er de danske, men kanskje snart de får:*
*Selvstendighet fra alle, og endelig bli fri.*
*Da vil vi være god nabo, ja, helt til evig tid.*

*Kan hende ligger rikdom, langt under havets bunn.*
*Kan hende de vil gjøre; det store oljefunn.*
*For oljen er kan hende, i vikingenes spor.*
*Og da vil Norge også få, en ekte olje-bror.*

Tórshavn 8. juli 2006

**Trygve Langrusten**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Højsted**, ættað úr Hvalvík, ferð til gravar úr Hvalvíkar kirkju hósdagin 13. juli kl. 14. Kistan kemur í kirkjuna mikukvøldið kl. 20. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Henry Heinesen** fer frá Kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni, hósdagin kl. 13.30. Tey, sum vilja minnast Henry, kunnu lata eina peningagávu til KFUM- og K.

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á 100 ára føðingardegnum við gávum og telegrammum og sum vóru við til at hátíðarhalda dagin. Ein serstøk tøkk til leiðslu og starvsfólk á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi. Hjartans tøkk øll somul fyri ein minniríkan dag.

Kærar heilsur
**Jacob V. Hansen**

# Tøkk

Takkað verður hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið góði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Thorvald M. Poulsen**
vanl. nevndur Thorvald í Øravík
Tvøroyri

doyði og varð jarðaður.

Takk til Jónsvein Bech, prest fyri troystarrík orð, til kirkjutænarar, organist og sangarar.
Takk til tykkum á Hotel Tórshavn, takk til tykkum mongu, sum hjálptu til við ervið, til tykkum, sum sendu heilsanir, ringdu og vitjaðu okkum, sendu kransar, blómur og peningagávur til hjartafelagið.
Takk til Føroya Prent og til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Selma**
**Paulina, Katrin, Heðin og Tórður**